## DAGSINS MEINING

# Eitt gylt høvi?

Tað er gott, at Landstýrið nú setur tiltøk í verk, ið skal minka um nøgdina av fiski, ið fer beinleiðis av landinum. Hetta hevur verið tiltrongt leingi, og skal landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hava rós fyri at gera nakað við hetta málið.

Ikki heilt óvæntað, so eru ráfiskaseljarnir ímóti, at meir fiskur skal um føroyskan keikant. Heldur ósmæðið, so er sjónarmiðið frá ráfiskaseljarunum, at teir til eina og hvørja tíð skulu sleppa at landa har, ið prísurin er bestur, óansæð hvat land talan er um. Onkur kundi kanska spurt, um hetta ikki er heilt náttúrligt í einari marknaðarstýrdari skipan. Svarið kundi verið játtandi, um frí kapping hevði verið um at sloppið framat hesum fiski, ið ráfiskaseljarnir vilja sleppa at selja frítt, men so er ikki. Tað ráfiskaseljarnir eftir øllum at døma vilja, er at halda fram við at verða vardir av ókeypis statsprivilegium, tá tað ræður um atgongd til rávøruna, men teir vilja hava fríar marknaðarkreftir at ráða, tá teir skulu selja.

Vit hava eina skipan í Føroyum, har fiskiveiðirættindi verða latin teim fáu, uttan nakað slag av auktiónskipan. Ætlar ungt fólk sær at fáa veiðirættindi undir Føroyum, so mugu hesi ungu fólk í flestum førum keypa gomul skip fyri ein yvirprís fyri at gjalda onkrum reiðara fyri tað frammihjárættindi, ið hesin sami reiðari í flestum førum einki betalti fyri. Henda skipan er ikki nøkur fyrimyndarlig skipan, og tað er væl skilligt, at Landsstýrið setur treytir við, hvar fiskurin skal landast, tá nú skattgjaldarin einki fær fyri veiðirættindini.

Tað hevur verið okkurt graml um, at onkur hugsar um at leggja flotan, um avmarkingar verða settar í gildi. Um álvara verður gjørt av hesum hóttanum, so er hetta eitt gylt høvi hjá Landsstýrinum um at biða um loyvini aftur. Hetta kann eitt nú ráfiskaraseljarafelagið ikki hava so nógv ímóti, tí um núverandi fiskiloyvishavarar halda, at tað ikki longur er lønandi at fiska undir Føroyum við nýggju krøvunum, so standa nógv í bíðirøð eftir at fáa hesi ókeypis loyvi við teimum nýggju treytunum.

Um teir núverandi fiskiloyvishavarnir vísa lítlan vilja til at halda fram við teimum sjálvfylgiligu treytunum, at samfelagið, ið letur frammihjárættindini til at fiska, skulu fáa eitt sindur av aktiviteti burturúr hesi rávøru, so kann hetta eisini gerast eitt gylt høvi til at broyta alla skipanina og til dømis auktionera tíðaravmarkað fiskiloyvi burtur til hægstbjóðandi. Hugskotini eru mong og skal tað verða okkara vón, at eitt mennandi kjak kann taka seg upp um hetta mál. Serliga hevur eitt slíkt kjak skund, um tað veruliga er so galið, at núverandi fiskiloyvishavarar ikki vilja fiska meir undir Føroyum við nýggju treytunum. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Flaggskipið »Mentanargrunnur Landsins« lækkar flaggið

**Oddfríður Marni Rasmussen**
*Nevndarlimur í LISA*



Í 2002 varð ein mentanarlig ætlan givin út, sum skuldi stinga út í kortið, hvussu mentanin skuldi síggja út í 2006. Gamalt orðatak sigur: Mongum brestir ætlan. Hetta vísir seg at vera meginreglan hjá politikarum, tá ið talan er um peningaliga játtan til skapandi listafólk. Nú sær aftur út til, at ætlanin er brostin.

Í álitinum frá 2002, sum eitur Mentan og Menning, kann í hvussu so er menningin strikast. Um álitið av politikarum varð tikið fyri fult, ella bara umhugsað, átti millum annað játtanin til Mentanargrunn Landsins at verið 5.850.000 kr. í 2004 og hækkað upp til 7.605.000 kr í 2005.

Tá ið nevndin í LISA (t.e. Listafólkasamband Føroya) og aðrir listabólkar sótu á fundi, við umboð í tá verandi Mentamálastýrinum um áðurnevnda álit, ljóðaði alt mikið hálovandi, mestsum ov, kunnu vit siga nú. Men tann, sum ikki er vanur við tað stóra, gleðist um alt tað smáa, sum verður givið einum. Og so varð eisini tá. Stórt var okkum í vænti.

Fyri at finna fram hækkingarnar, sum álitið nevnir, mátti eg kaga í tað. Aftast eru nakrar talvur. Har stendur: Landskassans útreiðslur til mentan í 1.000 kr. Orðið, sum slóg meg í hesum setningi var útreiðslur. Tað er nógv fyri, at tá ið talan er um mentan, eitur hetta útreiðslur, meðan, er talan um okkurt annað í samfelagnum, eitur tað stuðul. Orðið stuðul er ikki altíð eitt ókvæmisorð. Tá ið talan er um mentan, kann orðið brúkast í besta týdningi. Landskassin stuðlar ella ger eina íløgu í eina vinnu, sum er grundarlagið undir okkara samleika, og sum vísir seg aftur í øllum samfelagsins hjólum. Áhugavert hevði verið at vitað, hvussu nógvan pening ferðafólk leggja eftir seg á hvørjum ári ella hvussu nógvan pening list í síni heild gevur landskassanum. Hetta kundi verið ein uppgáva hjá Hagstovuni og Búskaparráðnum at funnið útav.

Støðan í dag er tann, at álitið er farið í mongumbrestir-ætlanar-bókina, bind 278.754. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi fíggjarár, hevur onkur politiskur dirvisloysingur verið við rakiblaðnum, og skorið eini 10% prosent av flagglínuni, so nú er flaggið á flaggskipinum "Mentanargrunni Landsins" lækkað. Í hesum fíggjarárinum, sum nú eisini er farið at lækka, er upphæddin á 4.800.000 kr. Eftir fíggjarætlanini (ein ætlan, sum sjálvdan brestir) fyri komandi fíggjarár, er upphæddin í Mentanargrunni Landsins 4.500.000 kr. Hvør missir so av hesari lækking á 300.000 kr? Jú, øll listafólk, skapandi og útinnandi. Hugsast kann, at einar 150.000 kr. verða tiknar av starvslønum til skapandi listafólk og einar 150.000 kr. verða tiknar frá verkætlanum millum annað bókaútgávum. So besnissaðir sum politikarar nú einaferð eru, so er tað upp til tey, ið varða av Mentanargrunni Landsins, hvussu skerjingarnar verða framdar í verki.

Tað vísir seg, at landsstýrið ikki hevur dirvið at gera sær sjálvum greitt, hvar skal sparast og, hvar ráðini ikki eru at spara, og tí eru teir farnir eftir rakiknívinum, og við honum skera teir eini 10 % allastaðnis. Hetta dirvisloysið er við at kosta ov nógv hjá ymiskum samfelagsbólkum. Nógv yngri listafólk støðast ikki her á landi. Grundin er eyðsæð tann, at her er ikki lívið laga hjá teimum.

# Opið skriv

## Til politikararnar!

**Ruberg Haraldsen**

Viðvíkjandi fyrispurninginum sum eg, Ruborg Haraldsen, setti á pallborðsfundinum mikukvøldið 27.10. á Føroya Fólkaháskúla, so haldi eg ikki, at svarið var nøktandi! Eg loyvi mær at ivast í, um tit yvirhøvur svaraðu mínum spurningi. Spurningurin var um, nær skúlin í Runavík verður liðugt bygdur. Eg vildi so gjarna, at tit politikarar kundu svarað mær skjótast gjørligt, so eg veit nær vit kunnu byrja í skúlanum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Landsbankin og peningastovnarnir (2)



**Felagið Peningastovnar**
*Tórshavn, hin 23. november 2004*

Í skrivi í bløðunum tann 16. í hesum, *Peningastovnarnir fara skeivir*, gevur Landsbankin Felagnum Peningastovnar eina rættleiðing.

### *Eitt* gjaldoyra - ein tjóðbanki

Felagið Peningastovnar ger galdandi, at høpi ikki í nóg stóran mun er í einum landsbanka (tjóðbanka) uttan egið gjaldoyra. Mótvegis hesum ger Landsbankin galdandi, at tað so heldur ikki er nakað høpi í tjóðbankunum hjá einstøku londunum í eurosamstarvinum. Her fer Landsbankin ov langt. Einstøku tjóðbankarnir hava sjálvandi minni at gera nú enn áður, men einstøku tjóðbankarnir eru fastur partur av eurosamstarvinum. Sostatt er Stjórnarráðið, sum er hægsti myndugleiki í Europeiska Miðbankanum, mannað við tjóðbankastjórunum úr teimum 12 eurolondunum.

Felagið Peningastovnar hevur framvegis tað sjónarmið, at ein tjóðbanki fyri hvørt gjaldoyra eigur at vera nóg mikið. Tað skerst ikki burtur, at peninga- og gjaldoyrapolitikkurin í Føroyum verður røktur av danska tjóðbankanum í Keypmannahavn. So leingi vit nýta donsku krónuna, fær tað illa verið øðrvísi.

### *Eitt* eftirlit - ikki tvey

Landsbankin ger galdandi, at hann, hóast hann ikki hevur eftirlit við einstøku peningastovnunum, hevur heildareftirlit við føroyska peningastovnsgeiranum. Heildareftirlit Landsbankans minnir eftir Felagsins fatan mest av øllum um eitt slag í tóman heim, tí Landsbankin ikki hevur møguleika at ávirka peningaviðurskiftini í Føroyum.

Heildareftirlitið, sum Landsbankin so heitt talar fyri, verður framt av Danmarks Nationalbank, sum hevur peningapolitisku amboðini, sum eru neyðug til at ávirka útlánsvirksemið í samfelagnum. Landsbankin hevur hinvegin als eingi amboð til at ávirka peningaviðurskiftini í Føroyum.

### *Ein* peninga- og kredittmarknaður

Landsbankin heldur treiskur fast við, at føroyski kredittmarknaðurin er ein sjálvstøðugur marknaður. Hesum er Felagið Peningastovnar ikki samt í. Føroysk virki og borgarar kunnu frítt lána uttanlands, og útlendskir peningastovnar kunnu ótarnaðir lána út í Føroyum.

Ein sjálvstøðugur peninga- og kredittmarknaður í Føroyum er treytaður av avmarkingum á kapitalflutningi til og úr Føroyum ella - sum vit fyrr hava kent tað - muni í rentuskatti av føroyskum og útlendskum millumverandum. Ongar avmarkingar eru viðvíkjandi kapitalflutningi í Føroyum, og samsvar hevur leingi verið í skattareglunum. Danski og føroyski peninga- og kapitalmarknaðurin eru sum samanbundin kør. Danskir og føroyskir peningastovnar javna dagliga stór gjaldførissveiggj sínámillum um Norðuratlantshavið. Tí gevur tað ikki meining at tosa um ein sjálvstøðugan føroyskan kredittmarknað.

### Er hetta eisini galdandi í Føroyum?

Landsbankin ger galdandi, at altjóða kredittmetingarstovnar vísa á, at gjaldførið hjá almennum myndugleikum verður betur umsitið, tá óheftir stovnar røkja tað. Men er hetta nú eisini galdandi fyri Føroyar, her kappingin við lóg er sett úr gildi?

Sambært Landsbankalógini frá 1992 skal landskassin altíð hava eina upphædd svarandi til í minsta lagi 15 pst. av bruttotjóðarúrtøkuni innistandandi í Landsbankanum. Ein margháttlig men fyri Landsbankan sera hent áseting. Men hevur Landsbankin so síðani 1992 givið landskassanum eitt yvirnormalt avkast av gjaldførinum? Hevur landskassin, ár undan ári, havt eitt avkast, sum er størri enn avkastið av eini óvirknari íløgu í virðisbrøv ella eini av handahógvi framdari íløgu á peningamarknaðinum? Ikki soleiðis sum vit skilja tað.

Landsbankin ger galdandi, at hann er trygd fyri, at peningastovnarnir ikki trýsta politisku myndugleikarnar til at lata gjaldføri landskassans ganga inn í dagliga gjaldførið hjá peningastovnunum. Landsbankin ber ótta fyri, at um landskassin setir gjaldføri sítt sum innlán í ein føroyskan peningastovn, er vandi fyri, at peningastovnurin ikki hevur pengingin tøkan, tá landskassin ynskir at ráða yvir innláni sínum. Hesin ótti tykist ógrundaður.

Føroysku peningastovnarnir eru fevndir av plaseringsreglunum í banka- og sparikassalógini, sum áleggja peningastovninum at hava nøktandi gjaldføri. Hinvegin er einki ið forðar politisku myndugleikunum í at seta gjaldføri landskassans í útlendskar peningastovnar. Ella í stutt, gjaldfør virðisbrøv.

Peningastovnarnir ganga ikki inn fyri eini lógarásettari plaseringsskyldu sum hesi, sum nú heldur Landsbankan leysan av allari kapping.

Móttøka og fyrilestur:

# Nýggjur professari í jarðalisfrøði á Setrinum

**Hósdagin 25. november heldur Robert James Brown, professari, starvstøkufyrilestur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum**

TÍÐINDASKRIV



Jim Brown tók 1. oktober við sum professari í jarðalisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Jim Brown er 61 ára gamal. Hann hevur starvast innan jarðalisfrøði á universitetum í fleiri londum. Síðani 1980 hevur hann verið knýttur at Universitetinum í Calgary í Kanada, men hevur eisini í styttri og longri tíðarskeið verið knýttur at øðrum universitetum sum gestagranskari, td. í Sydney í Avstralia og Luleå í Svøríki. Seinastu árini hevur Robert James Brown arbeitt sum serfrøðingur í jarðalisfrøði, serliga seismiskum datatænastum hjá norsku ráðgevingarfyritøkuni GeoGrids. Á yrkisleið sínari hevur Robert James Brown skrivað hópin av greinum í viðurkendum tíðarritum.

Robert James Brown tók master prógv í jarðalisfrøði á Universitetinum í Manitoba í Kanada í 1968. Í 1973 tók hann Ph.D. prógv í seismikki við Universitetið í Uppsala í Svøríki.

Sum vanligt, tá ið vísindastørv verða sett á Fróðskaparsetrinum, so er tað altjóða metingarnevnd, sum ger úrskurð. Í metingarnevndini hava sitið Dr. Bjørn Ursin, professari á Norges teknisk-naturvitenskapelige Universitet, í Stavanger, Dr. Páll Einarsson, professari á Háskóla Íslands og Dr. Robert S. White, professari á Universitetinum í Cambridge í Onglandi.

Í samband við professaratilnevningina skipar Fróðskaparsetrið fyri móttøku og fyrilestri í Ovastovu í Nóatúni hósdagin 25. november kl. 15.00, har Robert James Brown heldur starvstøkufyrilestur við heitinum "Nakað um jarðalisfrøði og nakað um tøl".

Fyrilesturin verður á norskum.